


*Nr. 23* *12. november 2017* *77. árg.*

# Tað gjørdi Gud

*Tað gjørdi Gud, við tað at hann sendi sín egna son.Róm. 8,3.*

Hvat var tað, Gud gjørdi? Hann læt okkum vita, at boðini eru givin, tí tey skulu haldast. Tað ræðandi er, at menniskju í tíð okkara uttan víðari hava blakað Guds boð í pappírskurvina. Tíðin hjá lógini er farin, verður sagt, og ein og hvør, sum hugsar seg um, má viðganga, at tað er ómøguligt at halda hesi boðini.

Nei, Jesus hevur ikki avtikið boðini; hann tekur tey øll undir einum í dupulta kærleiksboðnum og sigur: „Ger hetta, so skalt tú liva.“ Tí skal stórt dirvi til uttan víðari at avskriva boðini.

Men meira er at siga. Hvat var tað, Gud gjørdi, tá ið hann sendi sín egna son? Hann læt okkum vita, at vit eru hersett av einum fremmandum valdi. Tað at vit eru máttleys móti lógarinnar krøvum, kemst av syndini. Vit lata okkum lokka av lygnini, og eitrið hevur lammað vilja okkara, og vit eru máttleys, vit eru slept upp á fjall.

Men her er enn meira at siga. Av tí at Kristus kom og gjørdi seg til eitt við okkum í okkara glataðu støðu, er tað vón. Syndin hevði onki vald á Jesusi. Hendur hansara vóru fríar, eisini tá ið teir bundu hann fyri at føra hann til krossin. Frelsuna, sum ongin kann vinna sær sjálvum, hevur hann fingið til vega. Hon verður givin einum og hvørjum, sum trýr. Hann loysir okkum frá syndini og deyðanum.

Tað gjørdi Gud. Tí er støðan nú ein heilt onnur. Hóast tann óndi ákærir okkum, og vit standa heilt verjuleys, so svarar tann miskunnsami Gud álopum hansara við orðunum:

***„Hesin er frælsur!“***

***Náði tín hon er mítt skjól.***
***Paradísportrið er opnað mær,***
***aldri kann eg fulltakka tær***
***fyri gleðilig jól!***

# Gud, hví letur tú slíkt henda?

Gud kann lata okkurt gott spyrjast burtur úr onkrum døprum. Ein maður fortelur, at nakrar mánaðir eftir, at hann sum ungur drongur var komin til trúgv, helt hann, at tað var sum eitt tryggleika–garanti. Sum kristin hevði hann altíð tann altvaldandi og góða Gud aftan fyri seg. So har kundi aldri nakað ilt henda honum.

Men seinni gjørdist hann klókari. Eitt av mínum fyrstu veruligu skeldaríum við Gud snúði seg veruliga um tað. Nakrir trúgvandi doyðu í eini ferðsluvanlukku – enntá meðan teir vóru á veg til eitt annað land at býta út Bíbliur. „Gud, hvør er ætlanin? Hevur tú ikki lovað at verja okkum?“

Nú eftir mong ár saman við Gudi er tað okkurt eitt sindur løgið, hatta við tryggleikanum. Í einum føri kann Gud til eina og hvørja tíð velja at lata eitt undur henda og spara meg fyri alt tað, sum annars rakar menniskju. Hin vegin letur Gud skýggini koma við regni, og sólina skína yvir øll – bæði ónd og góð, so eg fái mín part av sjúku, vanlukku, trupulleikum o.s.fr. líka sum øll onnur.

Tryggleikin liggur í, at Gud stýrir lívi mínum. At kærleiki hansara, troyst og nærleiki, altíð eru hjá mær, og at hann kann nýta alt tað, sum hann letur henda í mínum lívi, so at alt endar væl. Tað endar nevniliga við einum ævinleika, har onki ilt er.

***Hvat hann tekur, hvat hann gevur,***
***faðirs hjartalag hann hevur,***
***og hans vilji er hin sami:***
***barnsins sanna gagn og frami.***

---

Tann nissan, sum hevur mest at gera undan jólum, er bissinissan (business)!! Jólini eru vorðin eini handilsjól, og Jesus, sum alt er um, verður gloymdur í øllum rokinum.

*e.c.* ums.

# Tá ið Jesus varð stolin

Hevur tú nakrantíð sæð eitt lítið modell av tí lítla Jesusbarninum, sum liggur í einari krubbu við nógvum hoyggi? Og krubban stendur kanska í einum fjósi, har dýr eru – kanska ein kúgv og einir tveir seyðir? Og Jósef og Maria standa kring krubbuna? Og kanska er ein stór lýsandi stjørna uppi yvir fjósinum?

Í summum londum gera tey eina slíka krubbu um jóltíðir? Og tá brúka tey eina dukku til at vera Jesus. Tað var eitt kirkjulið, har tey høvdu ráð at keypa eina ógvuliga fína Jesus-dukku. Hon kostaði 9.000 kr. Og hugsa tær, so varð Jesus-dukkan stolin. Tað hendi tvey ár upp í slag. Triðja árið settu tey ein GPS-ara inn í Jesus-dukkuna, og hann vísti vegin yvir til heimið hjá tjóvinum.

Men sjálvt bíligari útgávur verða viðhvørt stolnar úr handilsframsýningum, bara tí at fólki dámar tær. Einaferð fór ein maður yvir til eina framsýning, har tað lá ein umleið ein metur stór útgáva av pinkubarninum Jesusi í einari krubbu. Maðurin fór uttan eitt orð yvir og tók Jesus og fór út úr handlinum við honum í fanginum. Tá ið hann varð steðgaður og spurdur, hví hann hevði tikið dukkuna, svaraði hann: „Mær dámar hana, og eg vildi hava hana. So tí tók eg hana.“

Hugsa tær til, at fólki dámar so væl Jesus sum dukku, at tey stjala Jesus-dukkuna. Hvat heldur tú, at tey kunnu brúka eina Jesus-dukku til? Kunnu tey tosa við hana? Kann hon hoyra, hvat tey siga? Kann hon svara teimum? Er hon heit at leggja seg við? Nei. Ein Jesus-dukka er sum allar aðrar dukkur – hon kann ikki annað – enn tað, vit spæla, hon kann. Men kanska kunnu tey selja eina dýra Jesus-dukku til onnur og so sjálv fáa nakrar pengar burturúr.

Men hugsa so um tann rætta Jesus. Ber tað til at stjala hann? Kostar hin rætti Jesus nakað? Nei, hin rætti Jesus er ókeypis. Og øll kunnu fara og taka hann við sær – uttan at verða steðgað – tí Jesus vil so fegin verða tikin við.

Jesus vil fegin, at tú tekur hann við í lív títt. Hvønn dag, alt árið runt. Ikki bara sum eitt pinkubarn, men sum ein vaksin Jesus. Ein Jesus, sum hoyrir tað, tú sigur við hann. Ein Jesus, sum sær teg og sendir einglar sínar at ansa eftir tær. Ein Jesus, sum talar við teg.

Tann rætta Jesus kanst tú ikki selja og so fáa pengar fyri hann. Men tú kanst luta hann við onnur – eisini uttan at tað kostar teimum nakað. Og tað er tað framúrskarandi við Jesusi. Vit kunnu øll hava hann samstundis. Ongum nýtist at stjala hann frá onkrum øðrum. Vit kunnu øll hava hann.

Jesus vil fegin vera vinur við øll í verðini. Og tá ið tú hevur funnið tann rætta Jesus, so vil hann so fegin, at tú hjálpir øðrum at finna hann.

Adventnyt
*Effie Campbell* umsetti.

# Lítla bókin

Ein prestur vitjaði ein vin á sjúkrahúsinum. Hann hevði mist annað beinið, og nú máttu læknarnir eisini taka hitt. Kortini lá vinurin væl hýrdur í songini. „Sjúkrasystrarnar siga, at tú ert lukkuligasti persónur her á sjúkrahúsinum," segði presturin. „Um tú nú skalt siga tað púra erligt, krógvar tú teg aftan fyri eina masku? Fortreingir tú trupulleikan?"

„Nei," svaraði vinurin? „Eg eri so glaður" sum eg kann vera."

„Hvat er loyndarmálið?"

„Sært tú lítlu bókina har yviri á borðinum?" svaraði hann og peikaði á Bíbliuna. „Har havi eg mín besta heilivág. Tá ið eg kenni meg mótfalnan, lesi eg í henni."

Dávid upplivdi, hvussu gott tað var at líta á Harran undir øllum viðurskiftum. *„Eina góðska og náði mær fylgja allar mínar lívsins dagar."* (Sálmur 23,6).

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 12. nov. | Tekstur: | Matt. 26, 26–29; | bíbliuorð: Jóh. 6,48 |
| 19. nov. | Tekstur: | Matt. 14, 23; Jóh. 11,41–42; 17,9; Luk. 22,41–43;23,34+46 | bíbliuorð: Job. 22,27a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Repro– & prent:** Prenta, 35 77 74




*Nr. 24* *26. november 2017* *77. árg.*

# Allahalgannadagur

Tann fyrsta november var allahalgannadagur. Tann dagin lítur kirkjan frameftir móti tí, sum bíðar Guds fólki og prísar Gudi fyri Jesus, sum gevur okkum sigurin.

Samstundis líta vit aftureftir og hugsa um tey, sum einaferð vóru her. Serliga takka vit fyri tey, sum vóru okkara fyrimyndir til eftirfylgjan. Vit minnast við tøkk tey, sum stigu spor móti himli.

Soleiðis koma nógvar ymiskar kenslur fram allahalgannadag. Gleðin um tað, sum bíðar okkum, og sorgin um tey, sum vit mistu og sakna. Dagurin minnir okkum eisini á, at vit bara eru á gjøgnumferð her á jørðini. Tann løtan kemur, at vit ikki eru her longur, og um eini tvey–trý ættarlið eru vit helst gloymd.

Sunnudagsins tekstur myndar fyri okkum kristin, sum eru á veg til himmals. Eitt felagseyðkenni eru ‘tey í andanum fátæku.’ Í fyrstu syftu hugsa vit um hetta sum eitt ‘minusorð’ t.d. at tey hava lítið vit. Men í Guds ríki er tað mótsatt. Orðini ‘fátækur í andanum’ merkir, at eg veit við mær sjálvum, at eg eri fátækur í tí góða og í tí, sum er Guds vilji. Tað fátækdømið ger, at eg kann taka ímóti Guds ríkidømi í Jesusi.

Allahalgannadag kunnu vit líta fram ímóti, at vit í trúnni á Jesus møta honum sum frelsara, og har møta vit aftur okkara kæru, sum fóru heim undan okkum.

***Rita navn títt mær í hjarta,***
***Jesus kongur mín og Gud,***
***at ei sól, ei myrkur svarta***
***megna teg at máa út!***

***Hetta innsigl á meg set:***
***Jesus mín úr Nasaret,***
***hann, sum krossin mátti bera,***
***mær til sálargagn skal vera.***

# Alt verður nýtt

*Og eg sá nýggjan himmal og nýggja jørð*
*– Tann, sum sigrar skal arva hetta. Op. 21,1og 7.*

Eina vakra mynd vísti Gud Jóhannesi. Myndin gevur okkum eina hóming av, hvat Harrin hevur tilbúgvið okkum, sum av sonnum elska hann.

Men fyri at vit skulu koma hagar, mega vit eiga tað nýggja hjartað, sum er endurføtt við, at Guds Heilagi Andi hevur úthelt kærleikan í tað. Vit mega vera í Kristi sum nýggir skapningar, sum eru sátt við Gud og við Jesus Krist (2. Kor. 5,17). Og vit mega dagliga íklæðast hina nýggju menniskju, sum er skapað eftir Gudi í rættlæti og heilagleika sannleikans. (Ef. 4,24). Og vit mega leggja okkum nær at liva eftir tí nýggja boðnum: „Hetta er boð mítt, at tit skulu elska hvør annan, eins og eg havi elskað tykkum.“ (Jóh. 15,12). Og í lívi okkara skal ein nýggjur sangur ljóða. „Ein nýggjan song hann legði í í mín munn.“ (Sálmur 40,4) Tí at hann dró meg upp úr undirgangsins djúpi, úr tí botnleysa díki; hann setti mínar føtur á klettin og gjørdi føst míni fet.“ (Sálmur 40,3).

Men skulu vit verða verandi á vegnum móti hinum nýggja himlinum og hini nýggju jørðini, mega vit hvønn dag stríðast og sigra. Á henda hátt fáa vit lønina, sum Gud gevur sínum trúgvu tænarum. Skalt tú koma á mál, mást tú hava vilja at ganga vegin.

*t.* týddi.

---

Tríggir dreingir tosaðu um pápar sínar. Ein segði: „Pápi mín kennir borgarstjóran.“ Ein annar segði: „Pápi mín kennir løgmann.“ Tann triði segði sannførandi: „Tað hevur einki upp á seg. Pápi mín kennir Gud!“ Pápi og mamma, kenna tit Gud? Um ikki, so gevið honum lív tykkara í dag.

*e.c.* ums.

# Soleiðis prædikaði Luther

Tað týdningarmesta, sum skilir okkum frá heidningunum, er, at tú ikki bara lærir, at Kristus er føddur av Mariu moy og er harri og frelsari, men eisini gevur tær tað, at hann er ***tín*** harri og frelsari, so at tú kanst lovprísa honum og vera eydnuríkur.

Hesin dýrgripur má standa tær nærri enn alt í himli og á jørð, sum tað stendur í 73. sálmi:

„Bert eg eri hjá tær, leggi eg onki í heimin!"

Hygg, hvussu eitt menniskja gleðist, hevur tað bara fingið nýggj klæði ella tíggju gullstykki. Men hvussu mong dansa av gleði, tá ið tey hoyra prædiku eingilsins:

„Tykkum er í dag ein frelsari føddur?"

Ja, tey flestu halda, at tann prædikan, sum skal verða boðað, ikki er so týdningarmikil, og tá ið tey hava hoyrt hana, rýma tey og eru sum fyrr.

Tak tað, sum sagt er við teg, og takka Gudi, at hann soleiðis í náði hevur hugsað um teg, at hann hevur givið tær Frelsaran, og hann skal vera tín.

Og sum tekin um hetta hevur hann sent eingilin, sum skuldi kunngera tað, so at onki annað skal verða boðað, enn at hetta barnið er Frelsarin, og er nógv meira verdur enn himmal og jørð. Á hann skulu vit trúgva. *t.* týddi.

# Barnsligt álit

*Men hann bíði í trúgv og ikki ivandi; tí at tann, sum ivast, er líkur eini sjóvaraldu, sum reisist og fer undan vindinum.*
*Ják. 1,6.*

Trúgvandi barnsligt álit má vera í sálini, tá ið biðið verður. Uttan álit er bønin deyð og gróðrarlítil, ein plága og ein pína. Tann, sum biður, má fyrst vita, hvat hann ger: hann fer til Guds, sum hevur kallað hann og boðið honum, at hann skal koma og biðja í neyð síni, í øllum førum. Hetta stendst av álitinum.

Tínæst: sannføringin, trúgvin, at Gud veit tað, sum eg kenni á mær, hvat ið nívir meg, áðrenn eg sigi honum tað. Tað gongur faðirinum nær, tað, sum barnið ber fyri brósti.

Endaliga: sonarins vissa um, at faðirin er góður við meg. Forbøn hansara nýtist heldur ikki. Men tó biður hann í yvirflóð fyri okkum, fyri at vit ikki skulu ivast.

Gud hevur sagt: eg skal biðja, og hann vil geva. Jesus hevur sagt: faðirin vil geva, hann kennir neyð okkara, hann elskar okkum. Til hetta heldur trúgvin seg og sendir djevlinum ivan. Tí frá honum er ivin komin.

Ja, kæri vinur, tú mást fevna Gud og trúfesti hansara við báðum ørmum og ikki sleppa honum, tó at alt ilt vil skræða teg leysan. „Eg sleppi tær ikki, fyrr enn tú vælsignar meg.“ (1. Mós. 32,26) Ísraelsmaðurin, Jákup, talar longu soleiðis. Hvat skal hin kristni gera, sum hevur Gud í holdinum? Ein bróðir fer ikki frá bróður sínum. Ongin fer frá sínum egnu limum! ***Halt teg til Krist!***

*t.* týddi.

# Satsa upp á børn og ung!

Mangar talur eru hildnar um Jesu síðstu sjey orð á krossinum. Men eg havi einaferð hoyrt eina prædiku um „tey 7 síðstu orðini hjá meinigheitini:“ Vit hava ongantíð gjørt tað soleiðis fyrr!“ Evangeliið er hitt sama til allar tíðir; men arbeiðshættir og stílur mugu broytast.

Sunnudagsmøtini eru sum „í teimum góðu gomlu døgunum“, og tey ungu sleppa ikki framat við sínum sangstíli. Tann gamla meinigheitsmentanin verður konserverað, og lítið rúm verður givið fyri nakrari broyting.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 26. nov. | Tekstur: | Áps. 12.1–17 og Matt,7,7–8; | bíbliuorð: | Matt 7,7 |
| 3. des. | Tekstur: | Luk. 1,26–31+56–45+56; | bíbliuorð: | Luk. 1,37 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Repro– & prent:** Prenta, 35 77 74